# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur hóskvøldið 6. juli**
***Norðoya Vistarheim:*** kl. 19.30, Hans Eiler Hammer

**4. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Kvívík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Vestmanna:*** kl. 11.00 Hans Jákup Joensen, bispur
***Sørvágur:*** kl. 11.00, Sverri Steintún
***Kollafjørður:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, Hanne Sander
***Æðuvík:*** kl. 16.00, Hanne Sander
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Magnus B. Jørgensen og Meinhard Bjartalíð, altargangur
***Gjógv:*** kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 12.30 Messa, Emil Olsen
***Leirvík:*** kl. 11.00, altarg., Jón Poulsen, stud.theol. og Uni Næs
***Funningsfjørður:*** kl. 16.00, altarg., Uni Næs
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Árnafjørður:*** kl. 12.00 altarg.,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
***á Húsum:*** kl. 11.00, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Føroysku sjómansmissiónina
***Hvalba:*** kl. 12.30, Ólavur Rasmussen

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 11.30 Samfelagsløta, kl. 12.00 Tilbiðjunarmøti, kl. 12.00 Sunnudagsskúlin. Barnaansing er undir møtinum.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum luttaka trúboðararnir Ivor og Guðrun Tutty. Sunnudagsskúlin er í summarfrí. www.hebron.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Marna Nattestad. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti: Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting. Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta - Hildibrandur Olsen talar. www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Leygardag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Einar Vang hevur eitt orð. Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting - Evni: Ápostlasøgan, kl. 18.00 Evangel. møti - Evni: Ápostlasøgan. www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 22.00 Útimøti á Vaglinum. www. gospel.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti. Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Tummas Lauritsen.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit. Hósdagin verður konsert í Mariukirkjuni kl. 19.30. Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit. Sunnudag kl. 11.00 Hámessa og barnadóp v/ Benny Blumensaat, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. www.katolsk.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Hera Elttør - talað verður á donskum. Brynhild Petersen syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Í summarhálvuni hava vit onki morgunmøti. Kvøldmøti hvønn sunnudag kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti.

**Missiónshúsið, Libanon**
Um viðrar, verður útimøti niðri í bygdini í Sørvági sunnukvøldið 9. juli, kl. 18.00.

**Kedron, Sørvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting við uppingingarmøti verður kl. 11.00.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake v/ Arna Abrahamsen. Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við ymiskari luttøku. Sangur við Beintu og Inga. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti. Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti. Innsavnan til Thabor.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Jón Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta. Sunnudagsskúlin er í summarfrí, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Almu Bjartalíð. Kl. 22.00 Ungdómsmøti við Hanusi Simonsen, evni »Opinberingin«. Øll vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadaign kl. 20.30 Ungdómsmøti við André Matras. Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn og kl. 21.00 UngdómsRóp. Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við sunnudagsskúla, Andrá Matras talar. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar Gongufelag**
Túrur verður niðan á Múlatind sunnudagin 9. juli. Vit møtast kl. 14.00 uppi á Heltnini (Halgufellið). Túrurin er tungur. Tilmelding ikki neyðug.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Tilhaldið verður stongt:
3. juli–21. juli og
1. august–11. august.
24. juli–27. juli er opið frá kl. 10.00–17.00.
***Á Ólavsøku, 28., 29 og 30. juli er opið kl. 15.00–19.00.***
Í miðhæddini: Framsýning av bøkjaraamboðum.
Í kjallaranum: Søla av rabarbudessert og drekkamunni.
***Skeið fyri menn verður í horn- og træhandverki í Tilhaldinum 11.-15. sept. kl. 9.00-16.00. Lærari: Thue Christiansen úr Grønlandi, listhandverksmaður. Kostnaður 1850,- íroknað tilfar, amboð, drekka x 2 o.a. Tilmeld. 316491 frá 14. aug.***

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Tilhaldið fer í summarfrí og byrjar aftur í september. Lýst verður nærri.***
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Frá mánadegi 19. juni verður farið í summarfrí. Vit byrja aftur mánadagin 4. september. Gott summar.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00. Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00

**Brúdleyp**
8. juli giftast í Øse kirkju Hildigerð Johansen, Argir og Thomas Nielsen, Herning. Veitslan verður fyri innbodnum, Almevej 15, Nordenskov 6800 Varde.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni, Rókur Tummasarson, Tvøroyri og Kristín Baldvinsdóttir, Akureyri. Veitsla verður í AB-húsinum fyri innbodnum.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Dals kirkju Jacobina Nolsøe, Dalur og Søren Isak Sørensen, Måløv. Døgurði verður fyri innbodnum í Eiriksgarði.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Beinta Hilduberg og Martin Heinesen, Tórshavn. Veitslan verður kl. 19.00 fyri innbodnum heima á Djúpagilsvegi 2 í Hoyvík.

Leygardagin 8. juli kl. 13.00 giftast í Hebron í Leirvík, Ella Poulsen, Leirvík og Robert Larsen, Porkeri. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Fámjins kirkju Aslaug Joensen og Arnbjørn í Smiðjuni. Veitslan verður í Vesturhøll kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Miðvágs kirkju Marin Elisabeth á Høgabóli, Miðvágur og Kristoffur Vidtfeldt, Sandur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00.

Leygardagin 8. juli kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju, Sigrun Knudsen, Saltangará og Arni Højgaard, Toftir. Brúdleypsadr.: Bygdarhúsið í Leirvík, kl. 18.00.

**60 ár**
Sunnudagin 9. juli verður Páll Heinesen í Tórshavn 60 ár. Dagurin verður hildin heima í Tjarnarlág 4 frá kl. 13.00.

**80 ár**
Leygardagin 8. juli verður Jóhannus Ingvard Petersen, Saltnes, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Leitisvegi 44, Saltangará, frá kl. 19.00.

Týsdagin 11. juli fyllir Solveig Lowe, búsitandi í Onglandi 80 ár. Solveig er dóttir Jens í Skorti í Trongisvági. Familja og kenningar eru vælkomin at heilsa uppá Solveig, leygardagin 8. juli ímillum kl. 13.00 og 17.00 í heiminum hjá Elisabeth og Jákup í Trongisvági.

**85 ár**
Fríggjadagin 7. juli verður Karl Johan Mikkelsen, Tórshavn 85 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Karl Johan eru vælkomin í heimið hjá dóttrini á Mikkjalstrøð 18, frá kl. 18.00.